

*Sólin skein og fagnaðurin var stórur, tá toftamenn spældu seinasta dystin á árinum. Sigurin bar við sær, at B68 nú aftur fær sæti í fremstu føroysku fótbóltsdeildini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# B68 ivaðist ikki

**Talan gjørdist um sannførandi 8-1 sigur, har málverjin enntá slapp at skjóta seinsta málið, tá B68 syrgdi fyri, at teir aftur eru í bestu føroysku fótbóltsdeildini**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Frá flestu síðum varð sagt, at talan var um avgreiðsluspurning, tá B68 í seinasta umfarinum tók ímóti longu niðurflutta GÍ. Sjálvir vildu toftamenn tó ikki hoyra nakað tos av slíkum slag, og undan dystinum ávaraði venjarin eisini ímóti, at spælarar kundu taka ov lætt upp á uppgávuna.

Men tá alt kom til stykkis, so var eingin trupulleiki. Ikki bara vann b68 ein knúsandi tryggan sigur á GÍ. Argastu kappingarneytarnir hjá toftamonnum, B71, megnaði ikki at seta seg nóg væl upp, tá teir vitjaðu í Hvalba, og so vann heimaliðið tryggan 4-0 sigur í teirri uppgerðini.

Aðrastaðni kring landið tyrggjaði FS Vágar sær bronsuna, tá teir vitjaðu hjá B36. Og so hjálpti tað lítið hjá AB, at teir vunnu stórsigur á Sumba.

Størsti dramatikkurin var tó í Leirvík, har dysturin varð avblástur. Eftir samanstoytt fall ein av spælarum hjá HB í óvit, og ikki bar til at fáa nakað lívstekin frá honum í drúgva tíð. At enda kom sjúkrabilur á staðið, men tá vóru bæði við- og mótspælarar somikið skelkaðir, at dómarin ivaðist ikki í avgerðina um at blása dystin av. Tapið hjá B36 ber tó við sær, at úrslitið av hesum dysti bert hevur kosmetiskan týdning.

**Úrslitini:**

**B68-GÍ 8-1**
**AB-Sumba 7-1**
**B36-FSV 02**
**Royn-B71 4-0**
**LÍF-HB úsettur**

# Súni Fríði í serflokki

**Seinastu umførini eru málini mest sum rapaði av stylvunum hjá gomlu málrottuni, sum við fimm málum leygardagin undirstrikaði týdningin, sum hann hevur havt fyri AB í ár**

MÁLREVUR
*Jákup Mørk*

Størsta partin av árinum hevur tað annars verið Clayton Soares úr B71, sum hevur verið ovastur á máltindunum, men tann veruleikin stóð til at broyta. Við 14 málum í seinastu trimum dystunum setti Súni Fríði Barbá av álvara turbo á, og so fekk vandamikli brasiliumaðurin hjá sandoyingunum als ikki fylgt við.

Tað fingu liðfelagarnir í AB mest sum heldur ikki. Til samans skeyt AB í ár 55 mál í landskappingini, og ikki færri enn 31 av hesum vórðu altso signerað av Súna Fríða.

Hetta er annars ikki fyrsta ferðin, at Súni Fríði er besti málskjútti. Tvær ferðir hevur hann fingið gylta skógvin frá Thomas Dam Ítrótti, og tó at hesin ikki verður givin í aðru deild, so er neyvan nakar, sum kennir seg forsmáddan, um sagt verður, at AB hevur átt vandamesta áleyparan í deildini í ár.

Og hann verður so eisini við AB komandi ár. Tey boðini kundu lesast á heimasíðu felagsins sunnukvøldið, og so eru møguleikarnir væl ikki heilt eingir, tá tosast skal um sannlíkindini fyri uppflyting.

# Spæla í Gøtu mikudagin

Tað verða GÍ og B71, sum í vikuni fara at gera av, hvør av pørtunum skal hava seinasta sessin í Formuladeildini.

Miku- og leygardagurin eru eisini settir sum dagarnir, har upp- og niðurflytingardystirnir skulu fáast frá hondini, og verður tann fyrri av hesum í Gøtu.

Enn er ikki heilt vist, hvat klokkan dysturin verður spældur, men sum skilst í Gøtu, so er ætlanin, at dysturin skal spælast, meðan tað enn er ljóst, og tí verður byrjað antin kl. 16 ella 17.

**-mørk**

## formuladeildin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 27 | 15 - 9 - 3 | 38 | 17 | 21 | 54 |
| 2 | Skála | 27 | 13 -11- 3 | 55 | 30 | 25 | 50 |
| 3 | HB | 27 | 15 - 5 - 7 | 66 | 35 | 31 | 50 |
| 4 | NSÍ | 27 | 14 - 8 - 5 | 58 | 44 | 14 | 50 |
| 5 | EB/Streymur | 27 | 11 -10- 6 | 48 | 35 | 13 | 43 |
| 6 | ÍF | 27 | 6 - 9 -12 | 32 | 57 | -25 | 27 |
| 7 | KÍ | 27 | 7 - 4 -16 | 40 | 52 | -12 | 25 |
| 8 | VB | 27 | 6 - 6 -15 | 36 | 57 | -21 | 24 |
| 9 | GÍ | 27 | 6 - 5 -16 | 35 | 58 | -23 | 23 |
| 10 | TB | 27 | 5 - 7 -15 | 26 | 49 | -23 | 22 |

### 2. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 18 | 14 - 3 - 1 | 71 | 16 | 55 | 45 |
| 2 | B71 | 18 | 13 - 2 - 3 | 66 | 19 | 47 | 41 |
| 3 | FSV04 | 18 | 12 - 2 - 4 | 51 | 18 | 33 | 38 |
| 4 | AB | 18 | 12 - 2 - 4 | 55 | 33 | 22 | 38 |
| 5 | HB | 17 | 7 - 1 - 9 | 40 | 44 | -4 | 22 |
| 6 | Royn | 18 | 6 - 2 -10 | 27 | 52 | -25 | 20 |
| 7 | Sumba | 18 | 6 - 1 -11 | 34 | 68 | -34 | 19 |
| 8 | LÍF | 17 | 5 - 3 - 9 | 45 | 48 | -3 | 18 |
| 9 | B36 | 18 | 4 - 3 -11 | 21 | 47 | -26 | 15 |
| 10 | GÍ | 18 | 0 - 1 -17 | 18 | 83 | -65 | 1 |

## Máltindarnir

adidas

### Formula-deildin

| | | |
|---|---|---|
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 18 |
| Sorin Anghel | EB/S | 16 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 13 |
| Bogi Gregersen | Skála | 12 |
| Allan Mørkøre | B36 | 11 |
| Sámal Joensen | GÍ | 11 |
| Hans á Lag | HB | 11 |
| Dan Djurhuus | VB | 10 |
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 9 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 9 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 8 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 8 |
| Andy Olsen | NSÍ | 8 |
| Fróði Benjaminsen | B36 | 7 |
| Obele Okeke Onyebuchi | B36 | 7 |
| Rúni Nolsøe | HB | 7 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 7 |
| Óli Johannesen | TB | 7 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 6 |
| Jákup á Borg | HB | 6 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 6 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 6 |
| David Ahmed (Silla) | ÍF | 6 |
| Páll M. Joensen | NSÍ | 6 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 6 |

### 2. deild

| | | |
|---|---|---|
| Súni Fríði Barbá | AB | 31 |
| Clayton Soares | B71 | 25 |
| Jóhan Petur Poulsen | B68 | 16 |
| Magnus Olsen | B71 | 13 |
| Sonny Johansen | FSV04 | 13 |
| Birgir Joensen | FSV04 | 11 |
| Uni Arge | HB | 10 |
| Magnus Skorðalíð | LÍF | 10 |
| Øssur Jacobsen | B68 | 8 |
| Tummas Pauli Olsen | B71 | 8 |
| Hendrik Rubeksen | HB | 8 |